LÖGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Uttanríkispolitisk frágreiðing

**Týdningarmestu málini**

Frágreiðing til aðalorðaskiftis
sambært § 51, stk. 4 í tingskipanini

**Løgtingsmál nr. F-4/2014**

## Innihaldsyvirlit


**1. Føroyskur uttanríkispolitikkur ........ 4**

1.1 Løgfrøðiliga grundarlagið ........ 4

1.2 DFG-skipanin ........ 5

1.3 Trygdarmál og verjumál ........ 6

**2. Altjóða handilsviðurskifti ........ 7**

2.1 Handilssáttmálar okkara ........ 7

2.2 Russland og Evro-Asiatiska búskaparsamveldið ........ 7

2.3 Hoyvíkssáttmálin ........ 8

2.4 Heilsufrøðilig viðurskifti ........ 8

2.5 Útflutningsráð Føroya ........ 9

**3. Evropapolitikkur ........ 10**

3.1 Verandi samstarv við ES ........ 10

3.2 Gerðarrættarmálini móti ES ........ 11

3.3 Virksemið í Northern Periphery Programme ........ 11

3.4 EFTA-limaskapur ........ 12

**4. Sameindu tjóðir ........ 13**

4.1 Mannarættindi Sameindu tjóða ........ 13

4.2 Landgrunsmálini ........ 14

4.3 FAO ........ 15

4.4 UNESCO ........ 15

4.5 IMO ........ 15

**5. Norðurlandamál ........ 17**

5.1 Føroyskur limaskapur ........ 17

5.2 Danskur formansskapur ........ 17

5.3 Fjølbroytt samstarv ........ 17

5.5 Útnorðurráðið ... 19

**6. Arktis** ... 20

6.1 Tænastudepil ... 20

6.2 Arktiska ráðið ... 20

**7. Menningarsamstarv og neyðhjálp** ... 22

7.1 Útbúgving og heilsa raðfest ... 22

7.2 Neyðhjálp ... 23

**8. Havsins tilfeingi** ... 24

8.1 Strandarlandasamráðingar ... 24

8.2 Tvílandasáttmálar um fiskiveiðu ... 24

8.3 Millumtjóða fiskiveiðusamstarv ... 26

8.4 Millumtjóða hvalaveiðusamstarv ... 28

8.5 Hvalaveiða og almenn kunning ... 28

**9. Dupultskattasáttmálar** ... 30

9.1 Verandi skattasáttmálar ... 30

9.2 Norðurlendski dupultskattasáttmálin ... 30

9.3 Aðrir sáttmálar ... 30

## 1. Føroyskur uttanríkispolitikkur

Seinastu mongu árini hevur leikluturin hjá landsstýrinum á uttanríkispolitiska økinum verið alt sjónligari. Sum framkomið og væl skipað oyggjasamfelag og fiskivinnutjóð hava Føroyar ein týðandi leiklut í altjóða samfelagnum. Tað eru bara Føroyar, sum kunnu og skulu røkja síni uttanríkispolitisku áhugamál. Økta uttanríkispolitiska virksemið verður framt, sama um Føroyar ikki eru sjálvstøðugt land.

Løgmaður varðar av uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikki Føroya við teimum avmarkingum, sum ríkisrættarliga støðan hevur við sær. Flestu stjórnarráð umsita bæði arbeiðsøki og sáttmálar, sum hava við millumtjóða viðurskifti at gera. Sáttmálar um eitt nú skattlig viðurskifti eru hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum varðar av sínámillum samráðingum og strandarlandasamráðingum um fiskiveiðu, og landsstýriskvinnan í almannamálum tekur sær av norðurlandamálum.

Uttanríkispolitiska frágreiðingin fevnir sostatt ikki bert um ábyrgdarøki løgmans. Talan er um heildarpolitiska frágreiðing, sum tekur støði í teimum mongu uttanríkispolitisku økjunum, sum landsstýrið umsitir.

Umframt uttanríkispolitisku uppgávurnar, ið liggja beinleiðis hjá løgmanni, skal løgmaður tryggja neyðugu samskipanina av føroyskum áhugamálum á uttanríkipolitiska økinum.

Uttanríkistænastan á Løgmansskrivstovuni hevur dagligu fyrisitingina av nevndu uppgávum løgmans um hendi. Hon hevur saman við teimum fimm sendistovunum, ið bygnaðarliga eru partur av uttanríkistænastuni, yvirskipaðu uppgávuna at røkja áhugamál Føroya úti í heimi.

### 1.1 Løgfrøðiliga grundarlagið

Føroysk luttøka í altjóða samfelagnum hvílir løgfrøðiliga á heimastýrislógini frá 1948 og uttanríkispolitisku lógini frá 2005, umframt siðvenju á økinum.

Uttanríkispolitisku heimildir Føroya eru tengdar at, hvørt avvarðandi málsøkið er yvirtikið ella ikki. Tá ið talan er um yvirtikin málsøkið skipar uttanríkispolitiska lógin frá 2005, saman við siðvenju á økinum, karmarnar fyri luttøku Føroya í altjóða samfelagnum. Dømi um beinleiðis millumtjóðasamráðingar eru bilateralar handilssamráðingar og millumtjóða fiskivinnusamstarv . Harafturímóti, tá ið talan er um økið, hvørs málsøkið ikki er yvirtikið, men hvørs viðurskifti hava týdning fyri Føroyar,skal landsstýrið, í samsvari við Fámjins skjalið takast uppá ráð, við tí fyri eyga at hava veruliga medávirkan. Dømi um slík viðurskifti, eru millumtjóða fundir í OSPAR.

Uttanríkispolitiska lógin frá 2005 veitir Føroyum møguleikan í navni danska kongsríkisins at samráðast og gerast partur av sáttmálum við onnur lond og felagsskapum, tá ið hesir sáttmálar burturav viðvíkja málum, ið hoyra undir málsræðið hjá føroyskum myndugleikum. Tá ið Føroyar gera altjóðarættarligan sáttmála eftir hesi lóg, bera Føroyar vanliga heitið "Danmarkar kongsríki, Føroyum viðvíkjandi." Fyritreytin fyri hesum møguleika er, at hesir sáttmálar ikki viðvíkja Grønlandi, og at teir heldur ikki skulu galda fyri Danmark ella snúgva seg um samráðingar í

millumtjóða felagsskapi, har sum Danmarkar kongsríki er limur. Føroyar kunnu eisini sambært § 4 í uttanríkispolitisku lógini frá 2005 fáa limaskap í millumtjóða felagsskapum í egnum navni, treytað av at tað er sambærligt við reglurnar hjá felagsskapinum sjálvum og við stjórnarskipanarligu støðu Føroya. Hesin leistur eigur eftir fatan landsstýrisins at kunna nýtast til limaskap Føroya í WTO.

Uttan mun til ásetingarnar í uttanríkispolitisku lógini, virka Føroyar sum serstakur leikari á fleiri millumtjóða samstarvsøkjum. Eitt nú eru Føroyar sjálvstøðugur sáttmálapartur í ymiskum sáttmálum, sum viðvíkja felags umsiting av tvískattaavtalum og ferðandi fiskastovnum.

Hesir sáttmálar hava altjóðarættarligt gildi og mugu tí metast at vera gjørdir millum altjóðarættarligar eindir (subjekt). Tað hevur verið ført fram, at tá talan er um fyrisitingarligar avtalur, falla omanfyrinevndu sáttmálar eins væl og stjórnaravtalur ikki undir treytirnar, ið annars eru galdandi fyri sáttmálaviðurskifti Føroya sambært uttanríkispolitisku lógini, av tí at sáttmálarnir eru gjørdir millum stjórnir og ikki lond. Hesi sjónarmið eru illa sambærlig við grundleggjandi altjóðarættarligu regluna um, at altjóða bindingar verða gjørdar millum altjóðarættarligar eindir og ikki stjórnir. Við øðrum orðum ger altjóða lóg ikki mun á "stjórnaravtalu" og "ríkjaavtalu." Føroyar gera sostatt altjóðarættarligar sáttmálar, ið falla uttan fyri karmarnar á uttanríkispolitisku lógini.

### 1.2 DFG-skipanin

Uttanríkispolitiska lógin hevur eina týdningarmikla avmarking, tá ið talan er um altjóðarættarligar sáttmálar á yvirtiknum málsøkjum, ið viðvíkja bæði Føroyum og Grønlandi. Tá ber ikki til hjá landsstýrinum einsamøllum at taka avgerð, tí tað skal virka í felag við Grønlandi. Hetta slagið av altjóða luttøku verður rópt *"Danmarkar kongsríki, Føroyum og Grønlandi viðvíkjandi,"* stytt DFG. Treytin er, at talan er um sáttmálar, har Danmark ikki er partur, ella har ES umboðar Danmark sum sáttmálapart.

Dømi um hetta eru NEAFC, NAFO og NASCO, sum eru felagsskapir um fiskiveiðusamstarv í altjóða sjógvi, har Danmark er umboðað í sáttmálanum gjøgnum ES. Í hesum felagsskapunum eru Føroyar og Grønland við í felag undir heitinum DFG. Í SPRFMO luttaka Føroyar tó einsamallar undir heitinum "Danmarkar kongsríki, Føroyum viðvíkjandi," men Grønland hevur sambært uttanríkispolitisku lógini framvegis rætt til at gerast partur at stovnandi sáttmálanum av hesum økisfelagsskapi.

Sum limaland hevur DFG eina atkvøðu eins og hini limalondini í felagsskapunum. Føroyar og Grønland skulu sostatt vera samd um, hvussu farast skal fram, tá atkvøðast skal, t.d. um hvussu fiskiskapur eftir ávísum fiskaslagi skal skipast.

Føroyar og Grønland hava í samstarvinum lagt seg eftir, at um bert annað landið hevur ítøkilig áhugamál í einum fiskiskapi, verður tað hetta landið, sum ger av, hvussu atkvøðast skal. Eru áhugamálini ikki tey somu í einum máli, atkvøður DFG ikki. Hesin atkvøðuleistur hevur við sær, at Føroyar og Grønland verða sett uttan fyri ávirkan, tá ið londini hava ymisk áhugamál. Hetta kann vera sera óheppi, og kann gera tað torført at gera strategeiskar semjur við lond, sum vit hava felags áhugamál við, og síðani tryggja at hesar semjur verða samtyktar í NEAFC. Eitt dømi er makrelsemjan við Noreg og ES, sum vit (DFG) ikki kundu taka undir við í NEAFC.

## 1.3 Trygdarmál og verjumál

Í uttanríkispolitisku lógini er virkisføri Føroya í verju- og trygdarpolitikki avmarkað, tí trygdarpolitikkur og verjumál liggja hjá ríkismyndugleikunum í Keypmannahavn.

Løgtingssamtyktin frá 2004 um trygdarpolitikk Føroya legði eina kós, har ið landsstýrið skuldi vera kunnað um trygdarpolitisk og verjumálslig viðurskifti viðvíkjandi Føroyum. Eisini skuldi landsstýrið hava avgerandi ávirkan á slík mál.

Fyri at tryggja føroyskum myndugleikum veruliga ávirkan á felagsmál, ið viðvíkja Føroyum, eitt nú á verju- og trygdarpolitiska økinum, undirskrivaðu táverandi løgmaður og danski uttanríkisráðharrin í 2005 Fámjinsskjalið. Í Fámjinsskjalinum verður staðfest, at danska stjórnin skal taka landsstýrið við upp á ráð í málum, sum viðvíkja Føroyum ella týdningarmiklum føroyskum áhugamálum. Í samsvari við hetta hava umboð fyri landsstýrið luttikið í m.a. ymsum greiningararbeiði hjá danska verjumálaráðnum. Tíðliga í 2014 varð stór greiningarverkætlan sjósett av danska verjumálaráðnum til tess at greina tørv og virkisføri hjá donsku verjuni í arktiska økinum og í Føroyum. Uttanríkistænastan fylgir hesum arbeiði yvirskipað, og Fiskimálaráðið og aðrir myndugleikar í Føroyum hava eisini ymsar leiklutir í greiningararbeiðinum. Danska verjumálaráðið letur úr hondum frágreiðing frá hesum arbeiði í vár.

Síðan hetta greiningararbeiði byrjaði, er trygdarpolitiska støðan í okkara parti av heiminum nógv broytt, serliga av viðurskiftunum í Ukraina. Viðurskiftini ímillum Russland og vesturheimin eru spentari. Tó er vanliga metingin hjá myndugleikunum í arktisku londunum, at arktiska økið framvegis ikki er eitt trygdarpolitiskt spenningsøki, og allir partar raðfesta framvegis góða samstarvið í Arktis. Tað er kortini ikki greitt, hvønn veg tað ber við viðurskiftunum millum vesturheimin og Russland, so leingi politiska støðan er, sum hon er.

Landsstýrið heldur, at stríðið millum Russland og Ukraina eigur at verða loyst diplomatiskt, so at friðurin í Evropa verður varðveittur.

## 2. Altjóða handilsviðurskifti

Ein týðandi treyt fyri búskaparvøkstrinum í Føroyum er samhandilin við onnur lond. Endamálið við at gera fríhandilssáttmálar við fleiri og fleiri lond er at betra um marknaðaratgongdina hjá føroysku vinnuni. Vinnan fær betri møguleikar at fjøltátta og økja um virksemi sítt, og samstundis verður føroyski búskaparváðin spjaddur.

Uttanríkistænastan arbeiðir áhaldandi fyri at betra um útflutnings- og innflutningsmøguleikarnar við at virka fyri, at Føroyar fáa nýggjar handilssáttmálar við viðkomandi lond.

### 2.1 Handilssáttmálar okkara

Føroyar hava síðan 1991 gjørt handilssáttmálar við onnur lond. Í løtuni hava Føroyar fríhandilssáttmálar við ES, Ísland, Noreg og Sveis. Talan er sostatt um fýra sáttmálar við í alt 31 lond, nú ES fevnir um 28 limalond. Harafturat varð fríhandilssáttmáli við Turkaland undirskrivaður í Ankara í fjør. Sáttmálin kemur í gildi, tá ið innanhýsis stýrisskipanarligar mannagongdir hjá báðum pørtum eru lidnar.

Føroyar hava síðan 1. januar 1995 verið fevndar av danska limaskapinum í WTO. Sostatt eru altjóða ásetingar, sum eru gjørdar í hesum felagsskapi, eisini galdandi fyri Føroyar. Fyri eitt land sum Føroyar við sera opnum búskapi og nógvum samhandli við umheimin hava greiðar og einsháttaðar reglur í altjóða handli stóran týdning.

Tað eru nøkur ár síðan, at Føroyar settu sær sum mál at fáa sjálvstøðugan limaskap í WTO. Sum tollumveldi kunnu Føroyar sambært ásetingunum hjá WTO gerast sjálvstøðugur limir. Kortini skal greiða fáast á ávísum løgfrøðiligum viðurskiftum millum Føroyar og Danmark.

### 2.2 Russland og Evro-Asiatiska búskaparsamveldið

Føroyar hava í nógv ár arbeitt við at betra okkara handilsviðurskifti við Russland. Samstarvið við Russland er skjótt 40 ára gamalt. Fiskivinnusáttmálan við Russland frá 1977 varð undirskrivaður í einari tíð, tá ið heimurin var býttur upp í eystur og vestur. Hetta forðaði ikki Føroyum at samstarva á skynsomum grundarlagi við Russland.

Russlandspolitikkur Føroya er at tryggja eitt gott samstarv millum londini, sum byggir á góðar og varandi marknaðarmøguleikar hjá føroyskum fyritøkum á russiska marknaðanum. Føroyar og Russland samráddust í fleiri ár at fáa ein handilssáttmála landanna millum. Enn er ikki komið á mál. Síðan hevur Russland funnið saman við Kasakstan, Armenia og Hvítarussland í Evro-Asiatiska búskaparsamveldið, og fleiri limalond væntast at leggjast afturat. Tá hesi fýra londini hava funnið saman, ber ikki til einans at gera ein fríhandilssáttmála við Russland. Nú mugu vit gera fríhandilssáttmála við øll fýra londini umvegis búskaparsamveldið. Við øðrum orðum er málið hjá landsstýrinum at gera ein fríhandilssáttmála við Evro-Asiatiska búskaparsamveldið, ið kann tryggja fría marknaðaratgongd hjá føroyskum vørum til hetta stóra og økið.

Tað er einki at taka seg aftur í, at laksur og uppsjóvarfiskur standa fyri meginpartinum av okkara útflutningi til eystanlond. Fáa vit beint burtur tollforðingarnar, letur tað veruliga dyrnar upp fyri enn størri útflutningi til hesar marknaðir.

Avgerð um at seta á stovn Sendistovu Føroya í Moskva varð tikin, áðrenn politiska støðan í Eysturevropa brádliga broyttist í februar 2014. Støðan er framvegis spent millum Russland og Ukraina, Evropeiska Samveldið og onnur lond í Vesturheiminum. Kortini er diplomatiska samstarvið millum hesi lond ikki slitnað. Hetta sæst millum annað við almennum ruslandsvitjanum hjá stjórnarleiðarum í ES-limalondum í februar 2015, umframt almenna vitjan hjá forseta Russlands í einum ES-limalandi í mars 2015.

### 2.3 Hoyvíkssáttmálin

Hoyvíkssáttmálin er mest víðfevndi fríhandilssáttmáli, Føroyar hava við annað land. Sáttmálin bindur Føroyar og Ísland saman í eitt felags búskaparøki, har vørur, tænastur, persónar og kapitalur við ávísum undantøkum hava frítt at fara millum londini. Hoyvíkssáttmálin hevur verið í gildi síðan 2006.

Kjarnin í Hoyvíkssáttmálanum er, at ikki er loyvt at gera mun millum føroyskar og íslendskar vørur og tænastur, um tær lúka galdandi treytir, har tær verða marknaðarførdar. Við øðrum orðum skulu føroyskar vørur og tænastur lúka somu krøv sum tær íslendsku í Íslandi, og íslendskar vørur og tænastur somu krøv sum tær føroysku í Føroyum.

Hagtølini vísa, at samhandilin millum Føroyar og Ísland innan vørur og tænastur er vaksin, og londini samstarva eisini á fleiri nýggjum økjum. Nevnast kunnu heilsuøkið, útbúgvingarøkið, fjølmiðlasamstarv, gransking og mentan.

Yvirskipað hevur Hoyvíkssáttmálin tískil økt um samhandilin og samstarvið millum londini, síðan hann kom í gildi.

### 2.4 Heilsufrøðilig viðurskifti

Gongdin seinastu nógvu árini hevur verið, at handilsforðingar millum lond ikki bert snúgva seg um toll og kvotur, men eisini um fleiri onnur sløg av handilsforðingum. Talan er um tøknilig krøv av ymiskum slagi, eins og heilsufrøðilig krøv. Lond hava hvør í sínum lag síni egnu heilsufrøðiligu atlit at taka, og í tí sambandi er tað týdningarmikið, at skikkaðu myndugleikarnir í londunum sínámillum avtala, hvussu farast skal fram.

Av somu orsøk gjørdust Føroyar partur av heilsufrøðiliga samstarvinum í ES í 2001.

Heilsufrøðiliga avtalan hevur við sær, at føroyskur fiskur og fiskavørur hava frítt at fara til ES, uttan at heilsufrøðilig kanning verður gjørd við markið til ES. Hetta letur seg gera, tí at heilsufrøðiliga lóggávan í Føroyum er lagað til heilsufrøðiligu krøvini hjá ES. Á sama hátt hava allar ES-framleiddar matvørur frítt at koma til Føroya, hvat heilsufrøðiligum krøvum viðvíkir.

Heilsufrøðiliga avtalan við ES loyvir sum meginregla ikki Føroyum at útflyta annað enn fisk og fiskavørur til ES. Hinvegin kann ES útflyta allar vørur til Føroya. Orsøkin er, at Føroyar hava ikki lagað heilsufrøðiligu lóggávu sína til ta hjá ES á landbúnaðarøkinum.

Heilsufrøðiliga starvsstovan í Føroyum hevur gjørt avtalur við samsvarandi heilsufrøðiligar stovnar í Russlandi og Kina. Eurasiska búskaparsamveldið, ið telur Russland, Kasakstan, Hvítarussland og Albania, ásetir, at russisk eftirlitsfólk skulu kanna og góðkenna føroysk fiskaframleiðsluvirkir, áðrenn tey sleppa at útflyta matvørur til samveldið. Tá ið Heilsufrøðiliga starvsstov-

an verður góðkend sum skikkaður myndugleiki av myndugleikunum í Russlandi, fer stovnurin væntandi sjálvur at standa fyri hesum arbeiði. Hetta kann taka tíð.

Kinverski heilsufrøðimyndugleikin er øðrvísi skipaður. Tá ið Heilsufrøðiliga starvsstovan søkir um at fáa føroysk virki á kinverska listan, tekur kinverski myndugleikin hetta til eftirtektar.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eisini samband við myndugleikar í Brasil, Kanada og Vjetnam. Endamálið er at avtala nærri á hvørjum grundarlagi føroysk virki ótarnað kunnu útflyta sínar vørur har í framtíðini.

## 2.5 Útflutningsráð Føroya

Útflutningsráð Føroya varð stovnað í 2014. Endamálið er støðugt at betra um marknaðaratgongd og kappingarføri hjá føroyskum vørum og tænastum fyri á tann hátt at skapa búskaparvøkstur og arbeiðspláss í Føroyum. Útflutningsráðið skal millum annað veita løgmanni ráð um handilsviðurskifti í breiðastu merking.

Løgmaður og uttanríkistænastan fáa soleiðis neyðuga kunning um tann tørv, sum vinnan hevur á at fáa formliga atgongd til marknaðir í øðrum londum, so at hon fær bestu karmar at virka undir.

Fundirnir í ráðnum verða eisini brúktir til at varpa ljós á ymiskar forðingar, sum føroyskar fyritøkur og einstaklingar eru fyri í mun til útlendskar marknaðir. Hetta kunnu vera ymisk viðurskifti, sum føroysku myndugleikarnir annars ikki vóru vorðnir varugir við.

Ráðið fer somuleiðis at gera tilmæli um, hvussu vit kunnu tillaga bygnað og skipanir, eins og tað fer at gera uppskot um, hvørjir marknaðir og hvørjar vinnugreinar eiga at verða sett í miðdepilin. Ráðið er mannað við umboðum fyri vinnulív og almennar myndugleikar.

## 3. Evropapolitikkur

Føroyar eru evropeisk tjóð, sum er grundað á evropeiskan arv og evropeisk virði. Samstarvið við evropeisku grannar okkara hevur stóran týdning. ES-marknaðurin er størsti marknaðurin fyri føroyskan útflutning. Hóast alsamt størri partur av føroyska uttanlandshandlinum er við lond uttan fyri ES, hevur ES-marknaðurin framvegis stóran týdning. Í 2014 vóru 50 % av vøruútflutninginum og 63 % av vøruinnflutninginum í samhandli við ES.

Føroyar eru hvørki limur í ES ella EBS. Hetta setir okkum í eina serstøðu, tí flestøll grannalond okkara hava ES- ella EBS-limaskap.

### 3.1 Verandi samstarv við ES

Formliga sambandið millum Føroyar og ES er grundað á tríggjar sáttmálar: ein handilssáttmála, ein fiskiveiðusáttmála og ein granskingarsáttmála.

Verandi handilssáttmáli kom í gildi 1. januar 1997. Hann er seinast broyttur í 2008. Sáttmálin tekur burtur toll á øllum ídnaðarvørum millum ES og Føroyar, men avmarkingar eru á landbúnaðar- og fiskivinnuøkinum. Føroyar hava at kalla veitt ES fullkomnan fríhandil, men tollfrælsið er avmarkað til ávísar føroyskar vørur til ES-marknaðin. Gongdin hevur tó verið, at handil við fiskavørum er vorðin støðugt frælsari, síðan verandi sáttmáli kom í gildi. Kortini eru tað bert tær vørur, ið eru tiknar við á ein serligan lista (positivlistan), ið hava fult tollfrælsi ella tollfríar kvotur til ES-marknaðin. Hetta kann vera ein forðing fyri at menna og framleiða nýggjar útflutningsvørur í Føroyum. Í flestu førum er tað ikki lønandi at útflyta til ES-marknaðin, um tollur verður lagdur á vøruna. Dømi um hetta eru ætlanirnar hjá uppsjóvarvinnuni at útflyta niðursjóðaðan makrel, har tollur á 25 % verður lagdur á við verandi handilssáttmála við ES.

Sum nevnt er heilsufrøðiliga avtalan frá 2001 ein partur av handilssáttmálanum. Sambært avtaluni skulu Føroyar laga sínar heilsufrøðiligu reglur um djóra- og fiskaframleiðslu til samsvarandi ES-reglur. Harvið sleppur vinnan undan seinkandi og dýrkandi heilsufrøðiligum eftirliti við markið til ES-marknaðin.

Í 2005 gjørdust Føroyar partur av Pan-Euro-Med, ið er samstarv um felags upprunareglur. Ein av møguleikunum í skipanini er, at vørur kunnu skifta uppruna, um nakrar nærri ásettar treytir eru uppfyltar. Hetta gevur føroyskum fyritøkum høvi at keypa fisk úr t.d. Íslandi og Noregi, virka fiskin og útflyta hann sum føroyskan. Tað er tó ein fyritreyt, at vit hava fríhandilssáttmála við landið, sum vit keypa rávøruna frá, eins og tað skal hava fríhandilssáttmála við landið, sum vit selja vøruna til.

Fiskiveiðusáttmálin við ES varð undirskrivaður í 1977. Sáttmálin kom í gildi í 1981. Sáttmálin er ein rammusáttmáli fyri sínámillum býtið av fiskiveiðumøguleikum. Aðaltátturin í sáttmálanum er, at virðið á fiskiskapinum hjá ES og Føroyum skal javnviga. Myndugleikar úr Føroyum og ES hittast árliga at umrøða og avtala fiskiveiðubýtið og atgongd partanna millum næsta árið.

Føroyar hava síðan 2010 havt sáttmála við ES um granskingarsamstarv. Í 2010 gjørdu Føroyar eisini á fyrsta sinni granskingaravtalu við ES um atlimaskap í granskingarskránni FP7 (Seventh Framework Programme), sum var granskingarskráin fyri tíðarskeiðið 2007-2013.

Horizon 2020 er framhald og víðarimenning av evropeiska granskingarsamstarvinum og fevnir um tíðarskeiðið 2012-2020. Umframt stuðul til gransking, veitir Horizon 2020 eisini stuðul til nýskapan og til menning av nýggjari tøkni. Samlaði fíggjarkarmurin er áleið 525 milliardir krónur.

### 3.2 Gerðarrættarmálini móti ES

Tá ið ES á sumri 2013 avgjørdi at seta handilstiltøk í verk ímóti Føroyum, valdi landsstýrið at seta í verk eitt altjóðarættarligt gerðarrættarmál móti ES. Grundarlagið fyri gerðarrættarmálinum var havrættarsáttmáli Sameindu tjóða. Kæra Føroya var grundað á, at samráðingar um ferðandi fiskastovnar mugu vera á javnbjóðis grundarlagi, og at ES-hóttanirnar vóru brót á hesa grundreglu.

Umframt at hava sett í gongd altjóðarættarligt gerðarrættarmál sambært havrættarsáttmálanum hjá ST, settu Føroyar á heysti 2013 eisini í verk gerðarrættarmál sambært WTO-sáttmálanum. Kæra Føroya í hesum máli var grundað á, at handilstiltøkini hjá ES fylgdu ikki grundleggjandi reglum í WTO-skipanini, eitt nú um forboð ímóti mismunargerð, umframt at vísast kann á aðrar kravdar mannagongdir í havrættarsáttmálanum hjá ST í sambandi við ósemjur um felags umsiting av ferðandi fiskastovnum.

Í báðum førum var tað kongsríkið Danmarkar vegna Føroyar, ið setti í gongd gerðarrættarmálini. Kortini var tað landsstýrið, sum hevði ábyrgdina og skipaði bæði málini. Mótpartur Føroya í hesum trætumálum setti sum treyt fyri at seta handilstiltøkini úr gildi, at Føroyar steðgaðu gerðarrættarmálunum. Føroyar settu hinvegin sum treyt, at handilstiltøkini vórðu sett úr gildi, um gerðarrættarmálini skuldu steðgast. Um hetta samdust partarnir, tá ið av tornaði.

Ætlaðu gerðarrættarmálini vóru ikki einans eitt amboð hjá landsstýrinum at seta handilstiltøkini hjá ES úr gildi. Ein onnur orsøk var at forða fyri, at sama støða kemur í aftur í framtíðini. Í dag er ósemja um fleiri ferðandi fiskastovnar, men ES fer valla aftur at nýta heimildarreglugerðina, ið var grundarlag fyri handilstiltøkunum móti Føroyum.

### 3.3 Virksemið í Northern Periphery Programme

Føroyar hava verið partur av Northern Periphery Programme, sum nú eitur Northern Periphery and Arctic Programme (NPA), síðan 2001. Talan er um ES-skipan, sum gevur Føroyum atgongd til ein ES-økisgrunn, sum táttar í 400 mió. krónur. Skipanin tryggjar eisini Føroyum møguleikan at vera við evropeiskum netverkum innan gransking og íverksetan.

Í tíðarskeiðnum 2007-2013 hava Føroyar tikið lut í 14 ymiskum verkætlanum. Føroyar fingu hesi árini meiri pening úr skipanini, enn rindað var í hana.

Níggju lond eru við í skipanini. ES er umboðað við Finnlandi, Írlandi, Svøríki, Skotlandi og Norðurírlandi, og londini uttan fyri felagsskapin eru Føroyar, Ísland, Grønland og Noreg. Grannaøkini Kanada og Russland luttaka sum eygleiðarar. Nýggja skipanarskeiðið er frá 2014-2020.

### 3.4 EFTA-limaskapur

Føroyskur EFTA-limaskapur hevur ikki verið ovastur á breddanum í politiska kjakinum seinastu árini. Fyri nøkrum árum síðan varð møguleikin fyri EFTA-limaskapi kannaður, millum annað við tí í hyggju at gerast partur av EBS-samstarvinum. Tá vóru ávísar snávingarsteinar, sum máttu ruddast burtur, áðrenn limaskapur kundi gerast veruleiki. So leingi landsstýrið ikki sendir eina formliga umsókn um limaskap í EFTA til limalondini Noreg, Ísland, Liktinstein og Sveis at viðgera, fæst neyvan eitt endaligt svar uppá, um Føroyar kunnu gerast limur.

EFTA er ein virkin felagsskapur, ið áhaldandi virkar fyri at fáa fleiri fríhandilssáttmálar millum limalondini og onnur lond. EFTA hevur nógv handilssambond uttan fyri Evropa og er í dag tann felagsskapur, ið hevur eina flest fríhandilssáttmálar um allan heim. Eydnast Føroyum at gerast limur í EFTA, verður atgongdin lættari til handilssáttmálarnar, sum EFTA-londini stremba eftir at gera við onnur lond komandi árini.

## 4. Sameindu tjóðir

Føroyar luttaka í ymiskum felagsskapum og nevndum undir ST, t.e. Sameindu tjóðum. Føroyska virksemið í felagsskapum og nevndum undir ST byggir á eitt innanhýsis samstarv millum stjórnarráð og stovnar, sum tryggjar, at Føroyar røkja sínar altjóða skyldur sambært ST.

Eitt dygdargott samstarv er lykilin til, at Føroyar saman við Danmark við jøvnum millumbili lata ymiskar frágreiðingar til ST um mannarættindasáttmálarnar. Síðan 2004 hava Føroyar latið ST í alt 10 frágreiðingar. Tað sama góða samstarvið hevur eisini verið galdandi í sambandi við arbeiðið í landgrunsmálinum, har landgrunsnevndin hjá ST hevur havt týðandi leiklut.

Atlimaskapur okkara í ST-felagsskapunum FAO, IMO og UNESCO í egnum navni verður samstundis røktur í breiðum samstarvi millum viðkomandi stjórnarráð og stovnar í Føroyum.

### 4.1 Mannarættindi Sameindu tjóða

Mannarættindi eru hornasteinur undir einum fólkaræðisligum samfelagi, og Føroyar hava higartil tikið undir við sjey ymiskum mannarættindasáttmálum hjá ST. Teir eru:

- Semingin um borgarlig og politisk rættindi, (International Covenant on Civil and Political Rights).
- Semingin um búskaparlig, sosial og mentanarlig rættindi, (International Covenant on Economic, Social and Cultural Rights).
- Kvinnurrættindasáttmálin, (Convention on the Elimination of All Forms of Discrimination against Women).
- Sáttmálin móti mismuni vegna rasu, (International Convention on the Elimination of All Forms of Racial Discrimination).
- Barnarættindasáttmálin, (Convention on the Rights of the Child).
- Sáttmálin móti píning, (Convention against Torture and Other Cruel, Inhuman or Degrading Treatment or Punishment).
- Sáttmálin um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, (Convention on the Rights of Persons with Disabilities).

Til hvønn sáttmála hoyrir ein ST-serfrøðinganevnd, sum skal meta um, hvørt partarnir halda ásetingarnar í sáttmálunum. Grundarlagið undir metingunum eru frágreiðingar, sum partarnir lata nevndini fjórða hvørt ár, har teir útgreina, hvussu ásetingarnar verða fylgdar í landinum.

*ST-frágreiðingar*

Uttanríkistænastan samskipar arbeiðið at gera ST-frágreiðingarnar. Tað eru tó stjórnarráðini, sum í stóran mun hava neyðugu vitanina um, hvussu Føroyar fylgja ásetingunum í teimum ymsu sáttmálunum. Tí hava stjórnarráðini stóran leiklut at skriva partar av frágreiðingunum og annars at tryggja fakliga innihaldið. Føroyska frágreiðingin kemur við í frágreiðing frá Danmarkar kongsríki, annaðhvørt sum sjálvstøðugur partur ella sum fylgiskjal. Grønland arbeiðir eftir sama leisti.

*ST-hoyringar*

Tá ið ein frágreiðing er latin eini ST-serfrøðinganevnd, skipar ST fyri eini hoyring, har sáttmálalandið fær høvið at greiða frá, hvussu landið heldur seg til ásetingarnar í sáttmálanum. Síðan landsstýrið í 2004 fór at skriva ein sjálvstøðugan part til donsku ST-frágreiðingarnar, hava Føroyar eisini verið umboðaðar til tær ymsu ST-hoyringarnar. Tær eru skipaðar sum ein stýrd samrøða millum eina av serfrøðinganevndunum og donsku sendinevndina, umboðandi Danmark, Føroyar og Grønland. Føroyski parturin av sendinevndini hevur vanliga verið samansettur av einum umboði av Løgmansskrivstovuni og einum úr viðkomandi stjórnarráði. Hesin leistur tryggjar, at neyðuga fakliga vitanin er til staðar undir hoyringini, og at uttanríkispolitisk fyrilit verða tikin. Í 2014 luttóku Føroyar til hoyringina í sambandi við Sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, og í 2015 í sambandi við Kvinnurættindasáttmálan.

Eftir eina hoyring kemur serfrøðinganevndin við eini niðurstøðu um, hvussu hoyringin hevur gingið, og hon kemur við tilmælum og ráðgeving um, hvat serfrøðinganevndin metir, at Danmarkar kongsríki kann seta í verk fyri framhaldandi at tryggja borgarunum í øllum ríkinum tey rættindi, sum landið hevur bundið seg til. Tey tilmæli, sum beinleiðis eru vend móti Føroyum, verða viðgjørd av viðkomandi føroyskum myndugleikum, har teir taka støðu til, hvørjum tilmælum, teir kunnu taka undir við, og hvørjum ikki. Er tørvur á politiskari viðgerð av tilmælunum, verður hetta gjørt eftir galdandi mannagongdum.

## 4.2 Landgrunsmálini

Føroyar Rockall-háslættin er felagsheitið fyri allan føroyskan landgrunn innan fyri 200 fjórðingar og landgrunn uttan fyri 200 fjórðingar norðan fyri og sunnan fyri Føroyar.

Á vári 2014 tók landgrunsnevndin hjá ST (CLCS), undir við føroysku krøvunum um ytra landgrunnin norðan fyri Føroyar. Í hesum øki eru umskarandi krøv, og bæði Noreg og Ísland krevja partar av sama øki sum Føroyar. Býtið millum londini er tó treytað av, at hvørt land sær í minsta lagi fær viðurkent øki, sum í vídd svarar til tað, sum teimum verður tillutað í semjuni. Føroyar fáa tillutaðar í minsta lagi 27.000 ferkilometrar av landgrunninum. Hetta gevur okkum rættindi til at útvinna náttúrutilfeingi bæði á havbotninum og í undirgrundini. Noreg hevur fingið síni tilmæli, og í løtuni verður bíðað eftir, at Ísland fær síni. Síðan verður endaligt býtið gjørt.

Bretland og Írland sendu krøv síni til partar av Føroyar Rockall-háslættanum til CLCS í 2009, og Føroyar sendu krav sítt til syðra part av háslættanum til CLCS í 2010. Enn hevur Ísland ikki latið nevndini sítt krav. Seinastu samráðingarnar millum Føroyar, Bretland, Írland og Ísland um møguligt býti av syðra partinum av háslættanum vóru í 2011. Í næstum verður arbeitt við at fáa í lag nýggjar samráðingar við hesi lond.

### 4.3 FAO

Í 2007 gjørdust Føroyar atlimur í ST-felagsskapinum fyri matvørur og landbúnað, FAO (Food and Agriculture Organization). Tað er serliga í fiskivinnusamstarvinum, at Føroyar eru virknar. Føroyar hava talu- og framløgurætt, men ikki atkvøðurætt. Semja er tó um meginpartin av teimum avgerðum, sum FAO tekur.

Virksemið í FAO er sera umfatandi, og Føroyar hava raðfest luttøkuna í fiskivinnusamstarvinum. Hetta samstarv gevur atgongd til nógva vitan um alheims fiskivinnu, beinleiðis sambond við fiskivinnutjóðir kring allan heim og møguleika at vera við til at menna felags meginreglur fyri burðardyggan fiskiskap, handil við fiskavørum og aling. Ein týðandi táttur í at menna føroysku luttøkuna í framtíðini verður at samskipa regluligar frágreiðingar um føroyska fiskivinnu til FAO. Føroyar vóru við í samráðingum hjá FAO um at gera altjóða sáttmála um havnatiltøk til at basa ólógligari fiskiveiðu, um leiðreglur um djúphavsfiskiskap og um hjáveiðu og útblaking.

### 4.4 UNESCO

Í 2009 fingu Føroyar atlimaskap í ST-stovninum fyri vísindi, útbúgving og mentan, UNESCO (United Nations Educational, Scientific and Cultural Organization). Føroyar kunnu luttaka í øllum virksemi hjá UNESCO og hava talu- og framløgurætt, tó ikki atkvøðurætt á aðalfundum.

Føroyar eru við í virkna samstarvinum, ið Norðurlond hava í UNESCO. Norðurlond royna at virka fyri, at londini altíð hava eitt umboð í stýrisráðnum. Árini 2009-2013 var Danmark umboðað, og síðan 2013 og næstu fýra árini er tað Svøríki, sum er umboðað í stýrisráðnum.

Eitt av kendastu átøkum hjá UNESCO er heimsarvslistin. Á listanum eru dømi um mentanar- og náttúruarv, ið verður mettur at vera so serstakur, at serlig átøk skulu gerast fyri at varðveita hann. Sum liður í tilgongdini at fáa føroyskan mentanar- og náttúruarv á heimsarvslistan, skipaði tjóðarnevndin fyri almennum tiltaki um UNESCO-sáttmálar, heimsarv og føroyskan mentanar- og náttúruarv á Tjóðsavninum í november 2014.

### 4.5 IMO

IMO er felagsskapur Sameindu tjóða fyri sjóvinnu, og Føroyar hava síðan 2002 havt atlimaskap í hesum felagsskapi. Atlimaskapurin gevur rætt til at taka lut á øllum fundum, umframt rætt til at taka orðið og at senda inn skjøl til viðgerðar. Atlimaskapurin gevur ikki atkvøðurætt, men semja er tó um meginpartin av øllum avgerðum, sum IMO tekur.

Føroyar eru flaggstatur við altjóða skipaskrá, FAS. Vit skulu støðugt veita eina dygdargóða tænastu í sambandi við skipanina, og tað er týðandi fyri umdømið hjá FAS, at vit luttaka á IMO-fundum. Verður ikki møtt, verður tað viðmerkt av ICS (Flag State Performance Table).

Føroyar hava eisini tikið undir við flestu altjóða sáttmálum hjá IMO um eitt nú trygd á sjónum og um havdálking frá skipum. Føroyar hava tískil altjóða skyldu til at fylgja hesum reglum .

Harumframt verður nógv arbeiði gjørt í IMO við at fyribyrgja dálking og við at økja um trygdina á sjónum. Nú siglingin í Arktis væntandi fer at økjast, er uppskot um reglugerð fyri skipaferðslu í Arktis og Antarktis liðugt. Reglugerðin (Polar Code) fevnir um bygging, útgerð, rakstur, venjing, umhvørvisvernd, vakt og bjarging. Hon kemur eftir ætlan í gildi í 2017.

## 5. Norðurlandamál

Norðurlendska samstarvið er umráðandi liður í føroyskum uttanríkispolitikki. Í mongum viðurskiftum eru Norðurlond høgt í metum á altjóða pallinum, eitt nú viðvíkjandi fólkaræði, vinnulívi, nýhugsan, mentan og umhvørvisvernd.

Føroyar hava drúgvar royndir frá norðurlendska samstarvinum, og hetta hevur gagnað landi okkara fakliga og fíggjarliga. Vit fáa høvið at ávirka á høgum, politiskum stigi, og føroysk serfrøði fær møguleikan at gagnnýta norðurlendsk netverk og fígging í mongum viðurskiftum.

Kortini eru avmarkingar.

### 5.1 Føroyskur limaskapur

Royndir hava verið gjørdar at vinna Føroyum sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum og í Norðurlendska ráðharraráðnum (NMR), men higartil hevur ríkisrættarliga støðan verið roknað sum forðing fyri sjálvstøðugum limaskapi. Landsstýrið hevur, í samsvari við einmælta løgtingssamtykt, framvegis sum mál at gerast sjálvstøðugur limur.

Norðurlendska stjórnarsamstarvið byggir á Norðurlendska ráðharraráðið. Norðurlendsku forsætismálaráðharrarnir hava evstu ábyrgd av samstarvinum, eins og tað eru teir, ið seta nýggj, stór mál á skrá. Løgmaður hevur havt avmarkaða atgongd til fundirnar, men í 2014 eydnaðist at gerast partur av forsætisráðharrafundunum.

Samstarvsráðharrarnir hava dagligu ábyrgdina av fíggjarliga partinum av norðurlendska samstarvinum. Føroyski samstarvsráðharrin luttekur í øllum virksemi hjá samstarvsráðharrunum. Ráðharraráðini eru 10 í tali.

### 5.2 Danskur formansskapur

Í 2015 hevur Danmark formansskapurin í NMR. Fýra høvuðsevni eru sett á dagsskrá: vøkstur, vælferð, virði og sjógvurin í "Bláa Arktis". Føroyar hava gjøgnum Fiskimálaráðið formansskapin í NMR-samstarvinum um fiskivinnu og aling í 2015. Við hesum hava Føroyar ábyrgd av høvuðsverkætlanini "Vøkstur í bláum lívfeingisbúskapi," sum hevur fingið tillutað 8,3 mió. kr. komandi trý árini. Formansárið merkir, at Føroyar hava ein serligan møguleika at ávirka dagsskránna hetta árið, eins og fleiri fundir, ráðstevnur og annað verða í Føroyum.

### 5.3 Fjølbroytt samstarv

Bæði stjórnarráð og stovnar í Føroyum eru partar av einum ógvuliga fjølbroyttum og umfatandi norðurlendskum samstarvi. Luttøkan er ofta misjøvn, men tey, ið raðfesta og gagnnýta samstarvið, fáa nógvar ítøkiligar ágóðar burturúr.

Mentamálaráðið og stovnar undir tí hava í nógv ár verið sera virkin á norðurlendska pallinum. Nevnast kunnu øki sum mentan og list, gransking og hægri útbúgvingar. MMR er umboðað í hópin av fakpolitiskum nevndum og arbeiðsbólkum sum limur ella eygleiðari. Kendastur man vera Nordisk Kulturfond, sum hevur stuðlað nógvum virksemi í Føroyum gjøgnum árini. Grunnurin letur árliga um 30 mió. kr. til 200-250 verkætlanir.

Norðurlendsku nevndirnar og fundirnir geva bæði vitan, íblástur og faklig netverk. Samstarvið hevur stóran týdning í allari menning á teimum økjum, sum MMR varðar av.

Vinnumálaráðið luttekur í Nordisk Innovation, sum fæst við at lýsa, greina og stimbra nýskapan í Norðurlondum. Stovnurin gevur javnan út greiningar, frágreiðingar og hugskotsfaldarar um nýskapan, bæði í privatu vinnuni og hjá tí almenna. Stovnurin umsitir eisini stórar satsingar í nýskapan, har nú eisini føroyskar fyritøkur og stovnar luttaka í fýra verkætlanum. Nordisk Innovation arbeiðir í løtuni eisini við møguleikanum at skipa ein felags norðurlendskan íløgugrunn.

Føroyingar hava verið virknir frá fyrsta degi í Ny Nordisk Mad, ið byrjaði í 2007. KreaNord er líknandi skipan, tó at KreaNord meira hevur arbeitt við at orða uppskot um felags norðurlendskan politikk fyri at menna kreativar vinnur.

Heilsumálaráðið er við í NOMESCO-samstarvinum (the Nordic Medico-Statistical Committee), sum skal samskipa norðurlendsk heilsuhagtøl. Føroyar eru eisini við í NORDCAN-verkætlanini, sum er felags krabbameinsskrá hjá almennu norðurlendsku krabbameinsskrásetingarstovunum.

Almannamálaráðið og Hagstova Føroya umboða Føroyar í Nososko (Nordisk Socialstatistisk Komité). Nososko gevur árliga út eina samanbering av hagtølum og regluverki á almannaøkinum. Hetta verður mett at vera týðandi partur av norðurlendska samstarvinum á almanna- og heilsuøkinum.

Almannamálaráðið luttekur eisini í norðurlendska samstarvinum um brek, har uppgávan hjá stjórnarráðnum er at veita ráð um, hvørji brekpolitisk mál skulu takast upp hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum.

Arbeiðið at beina fyri marknaforðingum millum Norðurlond og í ríkisfelagsskapinum er eisini sera virkið. Nógvar forðingar eru longu loystar, og fleiri eru eyðmerktar og verða greiddar í næstum.

## 5.4 Økispolitikkur

Økispolitikkur er eisini stórmál í norðurlendska samstarvinum. Embætisnevndin fyri økispolitikk, EK-R, viðger og játtar pening til eina røð av verkætlanum, sum skulu styrkja um økismenning. Í løtuni verður gjørd ein kanning av møguleikum og avbjóðingum hjá ungdómi í norðurøkjum, serliga í Grønlandi, Íslandi, Føroyum og norðurpartinum av Skandinavia.

Norrønt atlantssamstarv, NORA, ið hevur skrivstovu í Havn, tekur stig til og er við í langtíðarverkætlanum, sum eru við til at styrkja samstarvið millum tey fýra londini í NORA-økinum, t.e. Føroyar, Grønland, Ísland og Noreg.

Norðurlendska ráðharraráðið hevur orðað eina arktiska samstarvsætlan. Málið er at stuðla og fremja samfelags- og búskaparmenning í arktiska økinum við atliti at fólki og umhvørvi. Nordisk Rådgivningskomité for Arktis, NRKA, er mannað av norðurlendsku umboðunum á embætis-

mannastigi í Arktiska ráðnum, og Føroyar hava eina virkna sjálvstøðuga luttøku í hesi nevnd. Eisini viðger nevndin umsóknir um stuðul til norðurlendskar verkætlanir um arktisk viðurskifti.

Uttanríkistænastan arbeiðir við at tryggja, at føroyska luttøkan í norðurlendskum samstarvi verður so munadygg, sum til ber. Ymiskt er, hvussu ráðini gagnnýta tilboðini á hesum øki. Norðurlendska samstarvið gevur nógvar ítøkiligar møguleikar, har Føroyar kunnu knýtast í netverk av ymiskum slagi. Hartil er hópin av møguleikum fyri fígging, og fundir og ráðstevnur kunnu eisini leggjast í Føroyum.

### 5.5 Útnorðurráðið

Útnorðurráðið er tingmannasamstarvsnevnd hjá Íslandi, Grønlandi og Føroyum. Ráðið hevur skipaða samstarvsavtalu við Norðurlandaráðið, men er ikki partur av felags norðurlendska samstarvinum. Útnorðurráðið ger útgreiningar og tilmæli í málum, sum hava týdning fyri londini í útnorðri.

Uppskot hevur verið frammi um at skipa útnorðursamstarvið við einum ráðharraráði, men hetta hevur ikki vunnið frama enn. Ráðharrar í útnorðri, eisini stjórnarleiðarar, hittast annars javnan í sambandi við virksemið hjá Útnorðurráðnum. Samstarvsráðharrarnir í Grønlandi, Íslandi og Føroyum hava gjørt avtalu um at vera formligt bindilið millum ráðið og stjórnirnar. Ráðið samstarvar eisini við Evropatingið og við Standing Committee of Parliamentarians of the Arctic Region (SCPAR). Søkt er eisini um eygleiðarastøðu í Arktiska ráðnum.

## 6. Arktis

Føroyar liggja við høvuðsdyrnar til Arktis, og hetta kann fáa stóran politiskan og búskaparligan týdning komandi árini. Á vári 2012 tók landsstýrið tískil stig til at útgreina, hvussu broytingarnar í arktiska økinum kunnu fara at ávirka Føroyar.

Útgreiningin, ið fekk heitið "Føroyar, eitt land í Arktis – møguleikar og avbjóðingar," varð løgd til aðalorðaskiftis í september 2013. Við støði í orðaskiftinum verður hugt nærri at, hvussu tilmælini í útgreiningini kunnu fremjast. Løgmansskrivstovan stendur fyri hesum arbeiði, ið skal gerast saman við avvarðandi stjórnarráðum. Ætlanin skal síðan leggjast fyri landsstýrið til endaliga støðutakan. Hetta verður væntandi gjørt seinni í ár.

Føroyar liggja væl fyri við vesturmunnan á landnyrðingsleiðini, ið verður mett at vera tann siglingarleið, sum fær størstan týdning komandi árini. Skipaferðslan er longu nú økt á havleiðunum kring Føroyar, og væntast kann, at ferðslan økist munandi komandi árini. Vaksandi virksemið hevur stórar búskaparligar møguleikar við sær. Loftar føroysk vinna møguleikunum, kann hon økja um sítt avkast og skapa enn størri framburð.

Økta vinnuliga virksemið í økinum kann tó hava umhvørvisligar avleiðingar við sær. Nógvir vandar kunnu gera seg galdandi, tá skipaferðslan økist, og hetta krevur trygd og tilbúgving á hægsta stigi – bæði fyri menniskju og umhvørvi.

### 6.1 Tænastudepil

Føroyar hava góðan møguleika at bjóða seg fram sum tænastu- og umskipingarhavn, nú skipaferðslan økist. Ein avbjóðing er tó, at føroyskar fyritøkur eru smáar, og uppgávurnar eru stórar og fjølbroyttar. Neyðugt er tí at samstarva og at samskipa virksemið, so til ber at veita skipum alt tað, teimum tørvar.

Umboð fyri vinnuna hava tí tikið stig til at skipa eitt samstarv um ein tænastudepil. Depilin skal vera opin fyri øllum fyritøkum, sum lúka tey felags góðskukrøv, ið sett verða, og sum megna at halda seg á einum javnt høgum stigi. Endamálið við samstarvinum er at kunna veita skjóta og góða tænastu til fiskivinnu, oljuvinnu og frálandsvinnu, umframt til vinnu, ið er avleidd av hesum virksemi.

Átakið samsvarar við ætlanina hjá landsstýrinum um at menna Føroyar sum ein altjóða sjóvinnu-, tænastu- og útbúgvingardepil.

### 6.2 Arktiska ráðið

Arktiska ráðið er einasta formliga millumtjóðasamstarv um arktisk viðurskifti. Limalondini eru USA, Russland, Kanada, Svøríki, Finnland, Noreg, Ísland og Danmark/Grønland/Føroyar.

Arktiska samstarvið byrjaði sum eitt umhvørvissamstarv í 1991. Í 1996 varð samstarvið víðkað til eitt samstarv á uttanríkispolitiskum stigi, og nú vórðu atlit eisini tikin at burðardyggari menning og livikorum hjá íbúgvunum í økinum.

Stóru broytingarnar í Arktis seinnu árini hava gjørt, at Arktiska ráðið er broytt grundleggjandi, og tað verður raðfest nógv hægri nú enn áður.

Tveir sáttmálar eru samtyktir av ráðnum um ávikavist leiting, bjarging og tilbúgving í sambandi við oljudálking. Tað er ikki óhugsandi, at aðrir leggjast afturat.

Áhugin hjá londum, sum ikki eru partur av Arktis, er eisini øktur munandi – bæði fyri økinum sum heild og fyri arbeiðinum hjá Arktiska ráðnum. Fleiri av hesum londum hava fingið eygleiðarastøðu í ráðnum, eitt nú Kina, India og Japan, og onnur hava søkt um tað sama.

Flestu evnini, sum verða viðgjørd í Arktiska ráðnum, eru yvirtikin málsøki, og Føroyar eru við til at orða og menna avgerðir, sum verða tiknar, so at tær hóska til føroysk viðurskifti. Fyrst og fremst snýr tað seg um at virka fyri týdninginum og rættindunum at gagnnýta havtilfeingið á burðardyggan hátt, at verja umhvørvið og at tryggja ein sjálvberandi búskap. Samstarv við viðkomandi ráð og stovnar, ið hava serkunnleikan, er fyritreytin fyri, at Føroyar kunnu vera ein virkin partur og gera sína ávirkan galdandi í arktiska samstarvinum.

Í mun til annað økisbundið millumtjóðasamstarv, har ið Føroyar annaðhvørt eru umboðaðar í egnum navni ella saman við Grønlandi (DFG), eru Føroyar í Arktiska ráðnum partur av eini tríbýttari sendinevnd saman við Danmark og Grønlandi. Hetta er skipað soleiðis, at Danmark hevur formansskapin í sendinevndini hjá kongsríkinum. Hugt verður eftir málsræði og luttøku í ymsu arbeiðsbólkunum, tá ið avgjørt verður, hvør skal sita fremst við borðið og bera sjónarmiðini hjá sendinevndini fram. Miðað verður ímóti, at allir tríggir partar eru sjónligir, og semja skal vera millum Danmark, Føroyar og Grønland um, hvørji sjónarmið, ið sendinevndin skal bera fram.

Í Arktiska ráðnum eru seks arbeiðsbólkar, sum eru mannaðir við serfrøðingum úr limalondunum. Føroyskir serfrøðingar luttaka í fleiri av hesum bólkum. Arbeiðsbólkarnir standa fyri flestu frágreiðingunum og støðulýsingunum, sum verða gjørdar í Arktiska ráðnum.

## 7. Menningarsamstarv og neyðhjálp

Í altjóða menningarsamstarvi taka Føroyar lut í felags átøkum at minka um búskaparójavnan í heiminum. Landsstýrið hevur samstundis sett sær sum mál at tryggja føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri triðja heiminum og altjóða viðurskiftum.

Orka verður løgd í at byggja upp samstarv við bæði føroyskar og altjóða viðurkendar hjálparfelagsskapir – stjórnarligar sum sjálvbodnar – til tess at vera saman við hesum felagsskapum um menningarverkætlanir. Miðað verður eftir, at menningarsamstarvið skal skapa møguleikar fyri virknari, føroyskari luttøku, har til ber. Menningarstuðul verður bert latin londum, sum OECD skilmarkar sum menningarlond.

Føroyar hava latið menningarhjálp síðan fyrst í nítiárunum. Í 2004 varð lóggáva gjørd á økinum. Lógin varð dagførd í 2007. Í lógini er ásett, at ráðgevandi nevnd skal veita landsstýrismanninum ráð um, hvussu lógin um menningarsamstarv kann fremjast í verki. Eisini verða allar umsóknir um menningarstuðul lagdar fyri ráðgevandi nevndina til ummælis.

Tað eru fleiri og fleiri felagsskapir, bæði føroyskir og útlendskir, sum venda sær til uttanríkistænastuna við umsóknum til verkætlanir og áheitan um samstarv. Til ber einans at stuðla umleið seks verkætlanum um árið. Seinastu árini hevur játtanin verið 2,5 mió. krónur. Menningarsamstarv verður umsitið av uttanríkistænastuni.

Føroyskir hjálparfelagsskapir eru smáir og hava ikki somu royndir sum stórir, altjóða felagsskapir. Uttanríkistænastan skipar tí regluliga fyri verkstovum, har føroyskir felagsskapir fáa kunning og ráðgeving í sambandi við umsóknir. Tiltøkini eru skipað sum kunnandi tiltøk, har felagsskapirnir eisini hava høvi at samskifta um felags áhugamál og avbjóðingar.

### 7.1 Útbúgving og heilsa raðfest

Grundhugsanin við føroyskum menningarsamstarvi er at veita hjálp til sjálvhjálp. Dentur verður tí lagdur á samstarv heldur enn á einvegis hjálp. Royndir vísa nevniliga, at tá ið samstarvsparturin er við til at menna verkætlanina og kennir ogn í henni, er mest sannlíkt, at virksemið heldur fram, hóast verkætlanin formliga er liðug.

Støðið verður tikið í framtíðar menningarmálunum hjá ST, Millenium Development Goals. Í fyrstu atløgu eru útbúgving og heilsa raðfest. Tað er grundað á, at útgangsstøðið fyri menningarsamstarvi er sjálvberandi menning, og tá er útbúgving grundarlagið. Góð heilsa er treyt fyri at kunna læra, og tí er heilsuøkið eisini raðfest. Somuleiðis verður miðað ímóti at gerast partur av fiskivinnuverkætlanum, tí her hava vit serstaka vitan og førleikar at lata.

Føroysk luttøka hevur verið knýtt at fleiri verkætlanum, ið stuðul hevur verið latin til. Talan er í nøkrum førum um stuðul til føroyskar felagsskapir, og í øðrum førum er føroysk serfrøði knýtt at verkætlanini. Á henda hátt kunnu vit menna okkara fakligu førleikar, skapa samstarv og fáa royndir at virka í altjóða viðurskiftum.

Menningarsamstarvið verður í høvuðsheitum framt saman við sjálvbodnum hjálparfelagsskapum og saman við ST-felagsskapinum, World Food Programme (WFP), hvørs endamál er at basa

hungri, at menna føðsluvirðið hjá teimum, ið svølta, og at stuðla sjálvberandi menning, har mattrot og hungur er.

## 7.2 Neyðhjálp

Endamálið við játtanini til neyðhjálp er at kunna veita bráðfeingis hjálp, tá ið vanlukkur raka úti í heimi. Hjálpin verður vanliga latin gjøgnum sjálvbodnar hjálparfelagsskapir so sum Reyða Kross og gjøgnum altjóða felagsskapir sum eitt nú World Food Programme. Játtanin verður eisini nýtt í sambandi við áheitanir frá altjóða myndugleikum um at lata pening til at basa hungursneyð.

Neyðhjálp hevur undanfarin ár verið partur av uttanríkisøkinum, men í málsøkjabýtinum frá 2011 varð málsøkið flutt til Heilsumálaráðið at umsita. Samstundis er játtanin til neyðhjálp hækkað úr 300.000 upp í 600.000 kr.

Í fjør varð neyðhjálp latin til Ukraina, Sýria og summi Balkanlond.

## 8. Havsins tilfeingi

Millumlandasamstarv um tilfeingi í havinum hevur fingið alsamt størri týdning, síðan fiskimørk vórðu flutt út á 200 fjórðingar í sjeytiárunum. Meginreglurnar fyri at gagnnýta havsins tilfeingi eru staðfestar í týðandi ST-sáttmálum, sum síðan eru gjørdir og eisini staðfestir í Føroyum.

### 8.1 Strandarlandasamráðingar

Føroyar luttaka sjálvstøðugt sum strandarland og sáttmálapartur í teimum millumlandaskipanum, sum gjørdar eru til at umsita ferðandi fiskastovnar í landnyrðingspartinum av Norðuratlantshavi. Strandarlandaavtalur hava verið gjørdar fyri sild, makrel, svartkjaft og kongafisk.

Seinnu árini hava ósemjur um býtið eyðkent strandarlandasamráðingarnar um ferðandi fiskastovnarnar. Í løtuni er eingin semja um norðhavssildina, og enn er eingin semja fingin í lag um felags umsiting av svartkjafti í 2015.

Frá 2010 til 2014 kundu strandarlondini heldur ikki semjast um makrelfiskiskapin. Í 2014 gjørdu Føroyar, ES og Noreg trípartaavtalu. Avtalan millum Føroyar, Noreg og ES fevnir kortini ikki um allan stovnin og øll viðkomandi lond, tí Ísland, Grønland og Russland eru ikki við í avtaluni.

Strandarlondini, Føroyar, Grønland og Ísland gjørdu í 2011 semju um kongafiskin í Irmingarhavinum saman við ES og Noreg. Hendan avtalan gekk út í fjør, og nú verður arbeitt við at gera nýggja semju. Somu lond, ið gjørdu avtaluna í 2011, hava samtykt at leingja verandi avtalu í eitt ár, tó við eini munandi skerjing í heildarkvotuni. Russland, sum ikki var partur av semjuni fyri 2011-2014, tekur ikki undir við hesi avtalu fyri 2015

### 8.2 Tvílandasáttmálar um fiskiveiðu

Føroyar hava í alt fimm tvílandasáttmálar um fiskiveiðu. Niðanfyri er ein stutt lýsing av teimum avtalum, ið Føroyar hava gjørt við onnur lond.

*Føroyar og Grønland*

Fiskiveiðusamstarvið millum Føroyar og Grønland er grundað á rammusáttmála frá 1997. Avtalan hevur givið Føroyum rætt til at fiska svartkalva og tosk undir Grønlandi. Harumframt hava føroysk skip havt rætt til royndarfiskiskap eftir rækjum í Eysturgrønlandi. Føroysk skip hava eisini atgongd at fiska helmingin av føroysku lodnukvotuni í grønlendskum sjógvi.

Grønlandi er loyvt at fiska norðhavssild í føroyskum sjógvi. Grønland kann eisini veiða part av svartkjaftakvotuni síni frá NEAFC í føroyskum sjógvi.

*Føroyar og Ísland*

Fiskiveiðusamstarvið millum Føroyar og Ísland er grundað á sáttmála frá 1976. Sáttmálin varð endurskoðaður í 1984. Sambært hesi avtalu er meginreglan, at Ísland ásetir mest loyvdu veiðunøgd av botnfiski hjá føroyskum skipum hvørt ár eftir samráðingar við føroyskar myndugleikar. Seinni er samstarvið víðkað til eisini at umfata sínámillum rættindi at fiska uppsjóvarfisk.

Føroyska botnfiskakvotan undir Íslandi fevnir um tosk og brosmu. Seinastu árini hava Føroyar við ávísum avmarkingum fingið tillutað 5 % av heildarkvotuni av lodnu, tó í mesta lagi 30.000 tons. Íslendskum skipum er loyvt at veiða eina kvotu av makreli og av aðrari sild enn norðhavssild í føroyskum sjógvi.

Londini hava harumframt eina skipan, ið gevur skipum atgongd at fiska norðhavssild og svartkjaft hjá hvørjum øðrum.

*Føroyar og Russland*

Føroyar og Russland hava havt eitt skipað fiskiveiðusamstarv, ið er grundað á rammusáttmála frá 1977. Í høvuðsheitum hava Føroyar latið uppsjóvarfisk afturfyri at fiska tosk og hýsu í Barentshavinum.

Føroyar hava kvotur av toski, hýsu og flatfiski í russiskum sjógvi, og føroysk skip kunnu eisini fiska rækju í russiskum sjógvi.

Russisk skip hava kvotur av svartkjafti og makreli og kunnu harumframt hava norðhavssild sum hjáveiðu í føroyskum sjógvi.

*Føroyar og Noreg*

Avtalan við Noreg gevur føroyskum skipum rætt at fiska tosk, hýsu, upsa og onnur fiskasløg sum hjáveiðu í norskum sjógvi. Harumframt hava Føroyar atgongd at fiska ein part av kvotuni, ið er fingin til vegar í sínámillum avtaluni við Russland, í norskum sjógvi. Her er talan um tosk, hýsu og onnur fiskasløg sum hjáveiðu. Føroyska toskakvotan við Svalbard er eisini umfatað av avtaluni við Noreg.

Noreg kann fiska longu, blálongu, brosmu, upsa og onnur fiskasløg og kann eisini fiska part av norsku kvotuni av svartkjafti í føroyskum sjógvi. Norsk skip hava hartil eina lítla makrelkvotu undir Føroyum. Í sambandi við strandarlandasamráðingarnar hava Føroyar og Noreg avtalað, at londini kunnu fiska makrel í havøkinum hjá hvørjum øðrum eftir einum ávísum leisti.

*Føroyar og ES*

Fiskiveiðusamstarvið við ES gevur Føroyum atgongd at fiska ein part av sínari makrelkvotu í ES-sjógvi, og ES-skip kunnu fiska somu nøgd av sínari kvotu í føroyskum sjógvi. Føroysk skip hava somuleiðis atgongd at fiska svartkjaft og norðhavssild í ES-sjógvi, og ES kann fiska tilsvarandi nøgd av svartkjafti og norðhavssild í føroyskum sjógvi. Føroyskum skipum er eisini loyvt at fiska

rækju í Eysturgrønlandi, umframt svartkalva og kongafisk. Føroyar og ES hava eisini avtalu um býtið av fleiri øðrum fiskasløgum.

### 8.3 Millumtjóða fiskiveiðusamstarv

Føroyar samstarva við nógv lond um tilfeingi í havinum ígjøgnum luttøku í millumtjóða-felagsskapum. Hesir eru økisbundnu fiskiveiðufelagsskapirnir NEAFC, NAFO, NASCO og SPRFMO. Tá talan er um altjóðarættarligar sáttmálar, ið viðvíkja bæði Føroyum og Grønlandi, luttaka Føroyar undir heitinum DFG (Danmarkar kongsríki, Føroyum og Grønlandi viðvíkjandi).

*NEAFC*

Føroyar eru við í NEAFC (North East Atlantic Fisheries Commission), sum er millumtjóðafelagsskapur fyri fiskiskapin í landnyrðingspartinum av Atlantshavi. Umframt DFG eru ES, Ísland, Noreg og Russland limalond. Hvør sáttmálapartur hevur eina atkvøðu.

NEAFC-sáttmálin fevnir um alt havtilfeingið í sáttmálaøkinum. Tó eru undantikin nøkur víð-ferðandi fiskasløg, eitt nú tunfiskur, feskvatnsfiskur og ávís hávasløg, sum eru fevnd av øðrum altjóða sáttmálum.

Føroyar eru strandarland fyri flestu fiskasløg, sum NEAFC ger samtyktir fyri. Talan er tískil um sera viðkomandi felagsskap fyri Føroyar, og eins og hjá hinum strandarlondunum er umráðandi hjá okkum at tryggja, at fiskiskapurin í altjóða sjógvi er burðardyggur.

Føroyar hava eisini áhugamál í teimum djúphavsfiskasløgum, sum eru at finna í altjóða sjógvi í NEAFC-økinum, t.d. búrfiski, stinglaksi og blálongu. Talan er um meiri avmarkaða nøgd, enn tá ræður um uppsjóvarfisk.

Tá ið talan er um ferðandi fiskastovnar, sum eru í havøkinum hjá limalondunum og í altjóða sjógvi, er skipanin vanliga hon, at londini semjast um eina heildarkvotu og eitt býti í sínámillum-sjógvi, umframt um eitt uppskot um fiskiskap í altjóða sjógvi. Samtyktin um altjóða sjógv verður síðan løgd fyri NEAFC til samtyktar.

Ósemjur millum strandarlondini um fiskiskapin eftir felags fiskastovnum hava tískil eisini ávirkan á arbeiðslagið í NEAFC. Sum dømi kann nevnast, at meðan ósemjan millum strandarlondini um t.d. makrelin hevur verið, hevur ikki borið til at fáa eina ítøkiliga semju um kvotur í altjóða sjógvi fyri makrel. Samtyktin hevur verið avmarkað til at tilskila, hvørji lond kunnu veiða makrel í altjóða sjógvi, og til ásetingar um, hvørjar veiðufráboðanir skulu sendast til NEAFC.

*NAFO*

NAFO (Northwest Atlantic Fisheries Organization) er millumtjóða felagsskapur fyri samstarv um fiskiskap í altjóða sjógvi í útnyrðingspartinum av Atlantshavi. Umframt DFG eru limalondini

Kanada, ES, Noreg, Ísland, Russland, Suðurkorea, Japan, USA, Kuba, Ukraina og Frakland vegna St. Pierre og Miquelon.

Føroyski fiskiskapurin í altjóða sjógvi í NAFO-økinum hevur serliga verið eftir toski á Flemish Kap (3M) og eftir rækju á Flemish Kap og Grand Bank (3L). Harumframt hava Føroyar smærri kvotur av svartkalva og kongafiski.

Føroyar hava 22,35 % av býtinum av toski á Flemish Kap. Tað er tað mesta, sum eitt einstakt land hevur. ES hevur 57,03 %, sum verða lutað millum níggju limalond, har Portugal og Spania fáa størstu partarnar. Í 2015 er føroyski parturin av toskakvotuni 3.083 tons.

Tað stendur sera illa til við rækjustovnunum, bæði á Flemish Kap og Grand Bank. Veiðubann hevur verið á Flemish Kap síðan 2010, og á ársfundinum hjá NAFO í 2014 varð eisini samtykt veiðubann fyri stovnin á Grand Bank.

Áðrenn veiðubannið var rækjuveiðan á Flemish Kap skipað við fiskidøgum. Føroyar hava rætt til 15 % av samlaðu fiskidøgunum á hesum øki. Síðan 2002 hava Føroyar saman við Grønlandi mótmælt rækjubýtinum á Grand Bank og ásett egna kvotu á 10,3 % av heildarkvotuni. Tá ið Føroyar valdu at áseta sær egna kvotu, hevði hetta við sær, at Kanada stongdi havnir sínar fyri føroyskum og grønlendskum fiskiskipum. Burtursæð frá tveimum styttri tíðarbilum hava kanadisku havnirnar verið stongdar síðan.

*NASCO*

NASCO (North Atlantic Salmon Conservation Organisation) er millumtjóða felagsskapur fyri umsiting av laksafiskiskapi í Norðuratlantshavi. Føroyar luttaka saman við Grønlandi undir heitinum DFG. Hini limalondini eru ES, Kanada, Noreg, Russland og USA.

Seinastu tjúgu árini hava Føroyar ikki rikið havfiskiskap eftir laksi. Stórur partur av laksastovnunum í Norðuratlantshavi verður mettur at vera sera illa fyri. Úti á havi verða ymsu laksastovnarnir fiskaðir saman, og ansast kann ikki eftir støðuni í einstøku áunum. Tí verður havfiskiskapur eftir laksi mettur at vera serliga trupul at umsita. Føroyar hava tó áhaldandi víst á rætt sín at veiða laks í føroyskum sjógvi og hava víst á skylduna hjá hinum limalondunum at bøta um støðuna í teirra áum. Hini limalondini í NASCO hava kortini hildið áfram við at veiða laks í áum og firðum í størri og minni mun, og NASCO hevur onga formliga heimild at skipa tílíkan fiskiskap.

*SPRFMO*

Í 2009 varð semja fingin í lag at seta á stovn økisbundna felagsskapin SPRFMO (South Pacific Regional Fisheries Management Organisation), sum skal umsita fiskiskap í Suðurkyrrahavi. Sáttmálin fevnir um veiðu eftir botnfiski og uppsjóvarfiski sum eitt nú rossamakreli, tó ikki veiðu eftir víðferðandi fiskastovnum so sum tunfiski.

Síðan 2010 er gingið aftur á hond við rossamakrelinum í Suðurkyrrahavi. Stovnurin er illa fyri, og londini í SPRFMO hava tískil samtykt munandi skerjingar í fiskiskapinum í mun til árini 2007-

2010. Ávísir glottar eru nú at hóma, og við støði í vísindaliga tilmælinum er veiðan eftir rossamakreli í 2015 hækka nakað.

Føroyska kvotan seinastu árini hevur sambært fyribils umsitingarligu tiltøkunum verið sløk 5.000 tons. Føroysk skip hava tó ikki verið til fiskiskap í Suðurkyrrahavinum síðan 2010.

## 8.4 Millumtjóða hvalaveiðusamstarv

Saman við Grønlandi, Íslandi og Noregi eru Føroyar sjálvstøðugur og stovnandi limur í Norðuratlantsnevndini fyri havsúgdjór, NAMMCO (North Atlantic Marine Mammal Commission). Økisbundin umsiting verður mett at vera besti háttur at tryggja eitt virkið samstarv um burðardygga gagnnýtslu av hvala- og kópastovnum.

Í 2015 verður umfatandi hvalateljing í norðurhøvum, har eisini Føroyar hava virknan leiklut. NAMMCO fer eisini í næstum at seta sjóneyku á møguleikarnar at betra um gagnnýtsluna av havsúgdjórum. NAMMCO-limalondini eru samd um at vísa á, at tað er ábyrgdarleyst ikki at fáa sum mest burtur úr hesum tilfeingi, samstundis sum flestu kópa- og hvalastovnar í Norðuratlantshavi eru søguliga væl fyri.

Altjóða hvalaveiðunevndin IWC (International Whaling Commission), samtykti í 1982 eitt fyribils bann fyri vinnuligari hvalaveiðu. Samtyktin er framvegis í gildi, og tískil eru Føroyar enn bundnar at veiðubanninum gjøgnum limaskapin hjá Danmark. Síðani tá hava limalondini úrslitaleyst roynt at finna semju um, hvussu vinnulig stórhvalaveiða aftur verður umsitin í IWC.

ES hevur samtykt at hava eina felagsstøðu til mál í IWC, og í høvuðsheitum hevur ES verið ímóti hvalaveiðu. Danmark hevur tó tikið fyrivarni fyri felagsstøðuni og tekur støðu til einstøk mál, fyrst og fremst við fyriliti fyri áhugamálum Føroya og Grønlands.

Føroyar ansa eftir, at føroysk áhugamál ikki vera fyri vanbýti ella á annan hátt koma at standa seg verri enn nú. IWC hevur ikki heimild at umsita smáhval, og Føroyar fylgja væl fyri at tryggja sær, at IWC ikki kannar sær heimildir at umsita onnur havsúgdjór enn tey, sum felagsskapurin longu umsitur. IWC skal heldur ikki samtykkja aðrar reglur, ið kunnu forða fyri, at burðardygg hvalaveiða verður uppafturtikin undir Føroyum, eitt nú ógrundaðar økisfriðingar.

## 8.5 Hvalaveiða og almenn kunning

Útlendskir djóraverndarfelagsskapir hava seinastu 30 árini funnist at grindadrápi. Kortini eru tað ikki djóraverndarfelagsskapir, sum avgera, hvussu grindaveiðan í Føroyum verður umsitin. Landsstýrið raðfestir kunning ovarlaga í sambandi við hvalaveiðu. Kunningarpolitikkurin byggir á royndirnar á økinum seinastu áratíggjuni.

Landsstýrið svarar stútt og støðugt fyrispurningum um grindadráp. Hetta verður millum annað gjørt við telduposti, beinleiðis samskifti við útlendskar miðlar og við heimasíðuni, whaling.fo. Eisini verða sosialu netmiðlarnir í størri mun til at kunna um grindadráp.

Hóast umtalan í sosialum miðlum tykist meira áleypandi og útbreidd í dag, er tað samstundis ein sannroynd, at áhugin millum miðlafólk, granskarar og onnur at lýsa grind í sínum rætta samanhangi hevur ikki verið størri enn nú.

## 9. Dupultskattasáttmálar

Dupultskattasáttmálar millum lond er eitt amboð, sum tryggjar greið viðurskifti, um farið verður í annað land at arbeiða, reka vinnu ella gera íløgur.

Aðalmálið við dupultskattasáttmálum er at tryggja, at dupultur skattur ikki verður goldin, tá ið borgarar og fyritøkur virka í tveimum ella fleiri londum. Eitt annað høvuðsendamál er at skapa betri karmar fyri vinnuligum virksemi tvørtur um landamørk.

Dupultkattasáttmálar áseta, hvussu skatturin verður býttur millum sáttmálalondini, og hvussu dupultskattur verður tikin av.

### 9.1 Verandi skattasáttmálar

Tað eru í stuttum tveir ymiskir mátar hjá Føroyum at fáa dupultskattasáttmála við onnur lond. Føroyar kunnu annaðhvørt gera beinleiðis avtalu við viðkomandi land ella gerast avtalupartur av dupultskattaavtaluni, sum Danmark hevur við viðkomandi land.

Føroyar hava gjørt beinleiðis dupultskattaavtalur við Norðurlond, so at tað slepst undan dupultskatting av forvunnum peningi. Avtalan fevnir um Føroyar, Ísland, Noreg, Danmark, Svøríki og Finnland. Eisini eru beinleiðis dupultskattaavtalur gjørdar við Grønland og Bretland.

Føroyar eru eisini partur av dupultskattaavtalum, ið Danmark hevur við India og Sveis. Føroyar eru samstundis saman við Danmark partur av felags OECD-hjálparavtaluni. Sum liður í eini OECD-verkætlan hava Føroyar sjálvstøðugt gjørt avtalur við fleiri smátjóðir um útflýgging av upplýsingum. Talan er um í alt 44 tjóðir, og Føroyar gjørdu í sama viðfangi dupultskattaavtalu við fleiri teirra. Hesar eru Bermuda, British Virgin Islands, Cayman Islands, Jersey, Guernsey og Isle of Man.

### 9.2 Norðurlendski dupultskattasáttmálin

Ein meginregla í norðurlendska dupultskattasáttmálanum er, at skattur av lønarinntøku í høvuðsheitum skal gjaldast í tí landi, har arbeiðið verður gjørt, og ikki í tí landi, har løntakarin býr og brúkar sínar vælferðartænastur. Landsstýrið hevur víst á, at henda áseting samsvarar ikki við norðurlendsku vælferðarskipanina og kann hava við sær óhepnar avleiðingar, serliga fyri smærru londini. Tað hevur higartil ikki eydnast at fáa størru londini at taka undir við at broyta sáttmálan á hesum øki.

### 9.3 Aðrir sáttmálar

Føroyska vinnan hevur eftirlýst, at Føroyar gera fleiri dupultskattasáttmálar. Í Føroyum er tað serliga frálandsvinnan, sum ynskir greiðari skattaviðurskifti.

Fyrireikingar eru gjørdar til, at Føroyar kunnu gerast sáttmálapartur í dupultskattasáttmálum, ið Danmark hevur við USA, Kanada, Brasil, Týskland og Holland. Næsta stig er at senda donsku

stjórnini eina formliga áheitan um at gerast sáttmálapartur í sáttmálunum, sum Danmark hevur við nevndu lond.